gult2 cyan2 magenta2 svart2



## NØVN Í VIKUNI

### Tórbjørn Mikkelsen 65 ár



Í morgin, 3. juni verður Tórbjørn Mikkelsen í Havn 65 ár.

Tórbjørn er kendur havnarmaður, føddur og uppvaksin á Tinghúsvegnum og í tí sjálvsagt føddur B36’ari.

Tórbjørn hevur øll árini, síðani hann fór úr Realskúlanum starvast á Gjaldstovuni, og er hann nú stjóri á Toll- og Skattastýrinum, sum húsast í glasborgini á Argjum

Hann var kendur hondbóltsleikari í Neistanum, men tá hondbóltsfelagið Kyndil varð stovnað, var hann rættiliga skjótt eitt av álitinum hjá teimum í mong ár.

Vit kenna hann ikki minni sum virkna losjulimin og í almenna politiska lívinum hevur hann í mong á sitið í líkningarnevndini í Havn, hann umboðaði Sambandsflokkin.

Tórbjørn er formaður fyri Meginfelag hjá sjúkrakassunum, og tað er at siga, hann er heilur, har hann er.

Hóast 65 ár, so er hann hin sami virkisfúsi – og er ein fittligur partur av arbeiðinum at umboða almennu Føroyar í teimum høvum, ráðstevnum og fundum til at leggja til rættis viðurskifti um toll- oig skattamál.

Eisini nú føðingardagin er hann á ferð – og tí ikki at hitta á Gundadalsveg 27 henda dagin - tillukku við degnum.



### Ingvør Nolsøe 50 ár

Mánadagin 4. juni verður Ingvør Nolsøe í Havn 50 ár.

Ingvør er helst mest kend frá sínum yrki sum reklamuteknari, men hevur hon eisini ofta traðkað fram og sagt sína hugsan, ikki minst, tá tað um kvinnusakina ræður – og Ingvør hoyrist, tá hon sigur sína hugsan.

Ingvør er ættað úr Klaksvík, men hevur tó røtur suðureftir. Hon er dóttir fyrrverandi løgtings- og landsstýrismannin, Eli Nolsøe úr Vági og konuna Lis úr Klaksvík.

Ingvør man vera ein tann fyrsti føroyingurin, ið fór burtur at læra til reklamuteknara – og eisini tann fyrsti at etablera seg við einum reklamuvirki burtur av. Hesum vóru tað ikki nógv, sum dugdu at síggja framtíð í fyri fjórðingsøld síðani.

Men í dag er hetta ein nógv brúkt og respekterað vinna, og kann ikki sigast annað, enn at Ingvør hevur verið við til at merkt føroysku reklamuvinnuna.

# Fimm fallin landsstýrisfólk…

**Anfinn Kallsberg er tann løgmaðurin, sum hevur mist flestar landsstýrismenn fyri borð…**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*



*John Petersen, dømdur í fongsul fyri neyðtøkur – legði tí frá sær*



*Signar á Brúnni, legði frá sær, tí ivi varð sáddur um embætisførslu hansara*



*Finnbogi Arge, legði frá sær, tí hann vildi aftur taka við sum stjóri í egnari fyritøku*



*Helena Dam á Neystabø legði frá sær, tí hon hevði brotið embætisskyldu sína*



*Tórbjørn Jacobsen, legði frá sær vegna ringa sinnalag sítt, sum hann ikki kann broyta*

Í gjár mistu vit enn ein landsstýrismann. Fyri aðru ferð í hesum valskeiðinum legði ein mentamálaráðharri frá sær, tí ivi var um hansara trúvirði.

Tað er sjálvandi hent fyrr, at landsstýrismenn hava lagt frá sær, men tað hevur ikki hent so ofta fyrr, at fólk leggja landsstýrisstarvið frá sær, tí tey ikki røkja tað til fulnar, tí tey lúgva, ella tí tey verða dømd í fongsul.

Í fimmtiárunum legði ein landsstýrismaður frá sær, tí hann varð valdur í Fólkatingið.

Í sekstiárunum doyði ein løgmaður, í sjeytiárunum doyði ein landsstýrismaður, ein annar legði frá sær av heilsuávum, og ein triði legði frá sær, tá hann varð valdur í Fólkatingið.

Í áttatiárunum fóru føroyskir politikarar at undir at slíta samgongur í úrtíð – og vórðu sostatt fleiri landsstýrismenn útskiftir av teirri orsøk, og hetta »óskilið« helt fram í nítiárunum. Fyrsta samgonguslitið tá var í 1993, tá Fólkaflokkurin fór úr samgonguni við Javnaðarflokkin.

Í samgonguni hjá Edmundi Joensen frá 1994 vórðu eisini fleiri landsstýrismenn skiftir út: Óli Jacobsen legði frá sær, tí hann vildu aftur røkja formansstarvið í Fiskimannafelagnum. Eftirmaður hansara, Axel Nolsøe legði frá sær, tí hann helt seg ikki megna uppgávuna nóg væl. Eftirmaður hansara, Kristian Magnussen, legði frá sær, tí hann skifti flokk. Og Edmund Joensen koyrdi Sámal Petur í Grund frá, tí hann sum løgmaður ikki var nøgdur við eitthvørt, hann hevði gjørt.

Men eingin hevur havt so nógvar trupulleikar av sínum landsstýrismonnum, sum Anfinn Kallsberg, løgmaður:

Fyrst var tað partamaður hansara, John Petersen, sum varð dømur í fongsul fyri neyðtøku.

Síðani var tað Signar á Brúnni. Ivi varð sáddur um embætisførslu hansara, og Tjóðveldisflokkurin vildi hava hann frá, meðan málið varð kannað. Stutt áðrenn niðurstøðan, sum fríkendi hann, kom alment fram, varð Tórbjørn Jacobsen settur í hansara stað.

Síðani var tað Finnbogi Arge, sum legði frá sær fyri aftur at taka við sum stjóri í egnu bilasølufyritøku síni.

Síðani varð ivi sáddur um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø. Tað vísti seg, at hon hevði brotið sína embætisskyldu, og legði hon tí frá sær.

Og í gjár legði Tórbjørn Jacobsen frá sær. Hann hevur havt trupulleikar av sínum knappa sinni. Hann heldur ikki, at hann kann broyta sinnnalagið, og valdi hann tí at leggja frá sær.

Eitt knapt ár er nú eftir av hesum valskeiðnum. Skal statistikkurin haldast við líka, so missir Anfinn Kallsberg ein ella tveir landsstýrismenn afturat – og skal býtið verða rættvíst, so fellur valið á Eyðun Elltør. Men verður nýggi landsstýrismaðurin hjá Sjálvstýrisflokkin eins óheppin, og Tórbjørn Jacobsen, so fellur valið kanska á Sámal Petur í Grund.

Livst so spyrst…



*Eingin løgmaður í Føroyum hevur havt so nógvar trupulleikar av sínum landsstýrisfólkum, sum Anfinn Kallsberg…*



# – Vit fáa ikki hjálpt Marjuni

**–Tað er rætt og slætt ein ómøgulig uppgáva hjá okkum at útvega hvørjum einstøkum bogarar tak yvir høvdið. Men vit hava sett okkum eitt djarvt mál og tað er at nøkta tørvin á grundstykkum, sigur borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen**

ÍBÚÐARNEYÐ

*Áki Bertholdsen*

– Vit fáa tíverri ikki hjálpt Marjuni at fáa eina íbúð.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn ásannar, at hann fær onki gjørt fyri at hjálpa Marjuni Joensen og hennara fýra børnum at fáa tak yvir høvdið.

Vit hava biðið hann um viðmerking til neyðarrópið hjá Marjuni Joensen í Havn í Sosialinum í gjár. Hon er einsamøll mamma at fýra børnum og er húsvill. Søgd upp at fara úr húsunum á Norðasta Horni í gjár, 1. juni. Hon hevur ongastaðni at fara. Hóast hon hevur gjørt alt, ið stendur í hennara makt, hevur hon onki annað fingið at búgva í og skal hon tí ikki enda á gøtuni, sær hon tí ongan útveg enn at blíva verandi í húsinum, til hon verður tveitt út við makt.

– Vit vita, at íbúðar neyðin í Havnini er ómetaliga stór. Men tað kann ikki vera okkara okkara uppgáva at útvega hvørjum einstøkum borgara tak yvir høvdið, tí tað er rætt og slætt ein ómøgulig uppgáva, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Fóru vit í holt við tað, høvdu tað skjótt staðið túsund fólk inni í Býráðnum við kravi um at fáa íbúð og tað er ómøguligt

Men hann ásannar, at íbúðarneyðin í Havnini er stór.

–Vit eru fullgreið yvir trupulleikan og tað er eisini raðfest rættiliga frammarlaga í arbeiðnum hjá býráðnum at útvega fleiri bústaðir til fólk.

– Vit hava sett okkum tað djarva mál í Býráðnum, at vit skulu nøkta tørvin á grundstykkjum, so tað arbeiða vit við av fullari kraft.

Hann sigur, at býráðið hevur tveir mátar at loysa hendan trupulleikan upp á.

Annar er at byggja sosialar íbúðir í stórum blokkum, sum vit kenna tað úr Grønlandi, men tað ætlar Býráðið ikki, tí vit halda ikki at tað er rætt at stúgva fólk saman í lítlum íbúðum.

– Vit ætla ikki, at skattaborgarin skal beala fyri at útvega øðrum íbúðir, men vit royna eisini at byggja øðrvísi, so at fólk, sum ikki vilja byggja, kunnu leiga. Sí eisini greinina um 400 nýggjar íbúðir í Havn.

Hinbegin ætlar býráðið at skapa karmar og at útvega stykkir, sum onnur kunnu byggja á, tí vit halda ,at tað er rættast, at fólk gjalda tað, sum tað kostar at byggja, ella at leiga, sigur Borgarstjórin í Havn.

# 400 nýggjar íbúðir í Havn um tvey ár

**Býráðið í Havn leggur stóran dent á at útvega fleiri íbúðir í Havnini. úrslitið av tí er, at um tvey ár eru einar 400 nýggjar íbúðir og nýggj hús til taks í høvuðsstaðnum, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri**

ÍBÚÐARNEYÐ

*Áki Bertholdsen*

Um tvey ár eru einar 400 nýggir bústaðir bygdir í Havnini.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur, at hetta er fyribils úrslitið av tí miðvísa arbeiði, sum Tórshavnar Býráð ger fyri at nøkta tað ovurhonds stóru íbúðarneyðini, sum er í Havnini.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn ásannar, at tann stóra flytingin til høvuðsstaðin hesi seinastu árini, hevur eisini ført eitt stórt íbúðartrot við sær.

– Vit eru fullgreiðir yvir íbúðarneyðina í Havn. Vit ásanna trupulleikan og hetta er eisini eitt mál, sum vit raðfesta rættiliga frammarlaga í býráðnum fyri at loysa.

Hann sigur, at fyribils er ein úrslitið av hesum arbeiðnum er, at skjótt verður ein útstykking upp á 170 grundstykkir klár at byggja á í Hoyvíkshaganum.

Somuleiðis er ætlanin at byggja yvir 100 íbúðir á Berjabrekku. Eitt privat byggifelag er í ferð við at byggja um 60 íbúðir. Samstundis er ein íbúðargrunnur í ferð við at byggja aðrar 60 íbúðir á Berjabrekku. Hesar seinastu 60 íbúðirnar eru leiguíbúðir, sum fólk, ið ikki hava hug at byggja, kunnu leiga.

At enda hava onnur privat byggifeløg í umbúna at byggja aðrar 100 íbúðir.

– Sostatt hava vit einar 400 nýggjar íbúðir í Havnini um tvey ár ella tað.

Jan Chistiansen sigur, at spurningurin um íbúðir ,er eisini ein spurningur um útboð og eftirspurning.

– Og tá ið eftirspurningurin á íbúðum er so stórur, sum hann er og útboðið so lítið, hevur tað eisini trýst prísleguna heilt upp ígjøgnum.

– Tá ið vit nú útvega fleiri íbúðir afturat, lættir tað ikki bara um trotið á íbúðum. Tað skuldi eisini lætt trýstið á prísirnir, so at teir lækka.

Jan Christiansen leggur dent á, at tá ið arbeiðið at útvega hesar 400 íbúðirnar, er liðugt, fer býráðið at halda fram og at gera enn fleiri útstykkingar.

Hann sigur, at býráðið hevur um 300 umsóknir frá fólki, sum vilja hava grundstykkir. Men hann heldur, at tað verður ikki meiri enn gott helvtin av teimum, sum vilja hava grundstykki beinanvegin men at hinir umsøkjararnir mest hava søkt fyri at tryggja sær eitt stykki seinni.

– Som, tá ið vit hava útvegað hesi 170 grundstykkini, meti eg, at tørvurin á grundstykkum er nøktaður fyribils.

– Men hetta loysir ikki sjálva íbúðarneyðina, og tí fara vit at halda á við fleiri útstykkingum beinanvegin, sigur Jan Christiansen.






gult3 cyan3 magenta3 svart3